


*Modellmynd*

danskar lógir til at avgera, hvussu vit skulu uppføra okkum yvir okkara medmenniskjum. Tað kunnu mentað fólk sjálvi finna út av, segði Egin Henriksen undir viðgerðini.

Varalimur Miðfloksins vísir eisini á, at í Føroyum skulu onnur virði ráða enn tey í okkara grannalondum. Millum linjurnar ber til at lesa, at støðan er hættislig í okkara grannalondum, tí tey hava valt at verja tey samkyndu.

– Hygg bara eftir støðuni í okkara grannatjóðum. Tað er ikki altíð rætt at fylgja øðrum. Tað modernaða menniskja vil altíð hava tað, onnur hava. Vit mugu vera á varðhaldi sum samfelag, og ansa eftir, hvørji virðir vit byggja okkara samfelag upp á.

Hóast tey samkyndu javnan hava víst á, at tey verða happað, so vísa løgtingslimir hesum uppáhaldi aftur. Hetta verður gjørt við at lýsa Føroyar sum eitt stað, har eingin er fyri mismuni.

– Vit eru ein kristin tjóð, og tí taka vit okkum væl av hvørjum øðrum. Tað er grundarlagið, og tí hava vit ikki tørv á lóggávu fyri at verja tey samkyndu móti mismuni, segði Alfred Olsen.

Tað verður eisini lagt nógv fyri at vísa aftur, at løgtingslimir hava nakað ímóti teimum samkyndu. Hetta er sambært Elini eisini ein háttur at hevja seg sjálvi upp um hini.

– Eg havi einki ímóti hesum fólkunum, men eg havi nakað ímóti teirri synd, ið tey draga inn í okkara land, helt Gerhard Lognberg fyri undir viðgerðini.

Jenis av Rana tekur synd í teimum samkyndu og vil hjálpa teimum.

– Bara 4-5 % av teimum samkyndu eru aktiv og militant. Tú hjálpir ikki teimum við at lurta eftir teimum militantu. Millum 80-95% ynskja at blíva frígjørd. Í teimum londum, har tú hjálpir teimum, eru tey fegin at blíva frelst frá tí, hevur Jenis av Rana sagt í Sosialinum.

### Eitt møti

Elin Mortensen heldur, at stórur partur av kjakinum ber brá av, at tú ert til eitt kristiligt møti heldur enn til eitt kjak í løgtinginum.

Kjakið vísir greitt, at átrúnaður fyllir nógv hjá øllum politikarum – eisini teimum sum siga seg vera fyri at víðka lógina. Átrúnaðurin er snøgt sagt í miðdeplinum, og eingin politikari torir at standa uttanfyri. Sum víst omanfyri, so er tað serliga Bíblian og tann kristna trúgvin, sum er grundarlagið hjá teimum, sum eru ímóti.

Hinvegin er rættiliga áhugavert at leggja til merkis, at teir sum tala fyri at víðka revsilógina, ferð eftir ferð mugu grundgeva fyri, at teir eisini eru trúgvandi, tí annars verða teir alt fyri eitt ákærdir fyri ikki vera trúgvandi.

Ein týdningarmikil orsøk til hendan atburð frá teimum, sum vilja geva teimum samkyndu innivist í revsilógini er, at teir bera ótta fyri, at føroyski veljarin ikki fer at stuðla teimum, um teir siga seg ikki vera trúgvandi, skrivar Elin Mortensen.

### Grønland og Føroyar

Í norðanlondum er tað bara Føroyar og Grønland sum ikki verja samkynd móti mismuni. Í komandi ári eru tað 20 ár síðan Danmark broytti revsilógina til eisini at umfata samkynd. Uppskotið um at víðka revsilógina hevur tvær reisur verið fyri í løgtinginum. Fyrstu ferð var í 1988, og tá var bara ein atkvøða fyri. 13. desember í fjør var aftur roynt og tá atkvøddu 20 løgtingslimir ímóti og 12 vóru fyri. Eftir tilburðirnar seinasta mánaðin hava Annita á Fríðriksmørk og Finnur Helmsdal gjørt av at royna enn einaferð.




# Bæði fjálgari og kalt at vera samkyndur



*Elin Mortensen hevur gjørt eina kanning av støðuni hjá samkyndum í Føroyum.*

**Tey samkyndu eru bæði hørm og ill um tónan í kjakinum. Hinvegin fegnast tey um, at evnið verður umrøtt eftir at hava verið fortrongt í nógv ár. Tað stendur at lesa í uppgávuni um samkynd hjá Elini Mortensen**

SAMKYND
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

– Eg gjørdist frá mær sjálvum, tá tað gjørdist greitt, at vit ikki fingu innivist í revsilógini. Eg haldi politikararnir eru nøkur neyt.

Tað kemur valla óvart á nakran, at tey samkyndu gjørdust vónbrotin av, at uppskotið hjá Finni Helmsdal og Annitu á Fríðriksmørk ikki bleiv samtykt í fjør. Í uppgávu síni hevur Elin Mortensen eisini gjørt samrøðu við fýra samkynd úr Føroyum, og spurt tey, hvat tey halda um kjakið í Føroyum.

Tey siga seg bæði vera vónbrotnan, men gleðast eisini samstundis um kjakið.

### Atfinningarnar

Tey fýra gjørdust bæði hørm og óð um tónan í kjakinum. Teir løgtingslimir, sum atkvøddu ímóti, verða lýstir sum láturligir, primitivir og óvitandi. Føroya Løgting verður eisini mett at vera eitt amatørparlament, sum tey málbera seg.

Víst verður á, at tað er bara teir heilt konservativu kristnu politikararnar í løgtinginum og Miðflokkinum, sum tú veitst, hvar tú hevur, tá kjakast verður um støðuna hjá teimum samkyndu í Føroyum. Restin eru nakrar hosur, sum ikki tora at taka eina sjálstøðuga støðu, men renna aftaná, har veljararnir eru, halda tey.

Øll fýra taka Miðflokkin burtur úr rúgvuni. Ilskast verður um, at flokkurin sigur tað er fyri teirra egna besta, at uppskotið ikki bleiv samtykt, tí innast inni ynska tey at verða frígjørd frá teirra homoseksualiteti, sum Miðflokkurin málber seg. Ein av persónunum, sum samrøða er gjørd við, sigur, at Miðflokkurin hevur bjóðað teimum samkyndu at fara til Toronto fyri at lekja tey frá teirra sjúku.

Tey smírast eisini eftir flokkinum.

– Tað var onkur sum segði, at varðveita vit ikki virðingina fyri Gudi, so fer Gud ikki longur at vælsigna Føroyar og føroysku fiskivinnuna. Við øðrum orðum lata vit tey samkyndu hava tað gott í Føroyum, so missa vit fiskin av grunnunum [...] Also hvussu langt út kann eitt kjak fara, verður spurt.

### Stuðul

Hóast tey kenna seg traðkaðan á, so eru tey tey fýra kortini fegin um kjakið. Tey fegnast um, at fólk verða noydd at taka støðu til eitt mál, sum nærum hevur verið forboðið at tosa um í Føroyum. Tey halda, at tað er lættari at liva sum samkyndur í Føroyum í dag enn fyri 10 árum, tí tá tordi eingin at taka evnið upp. Tey kenna seg eisini at hava ein stóran stuðul í Føroyum, og stuðulin gevur teimum eina vón um eina bjartari framtíð fyri samkynd í Føroyum.

Persónarnir, sum samrøðurnar vórðu gjørdar við, vóru millum 26 og 33 ár. Talan var um tvær kvinnur og tveir menn. Tvey teirra búgva í Danmark, meðan hini bæði búgva í Føroyum.